











*„Gleðiboðskapurin er, at við sama myndugleika talar Jesus til okkara í dag: Jesus sigur: "Eg eri vegurin, sannleikin og lívið!", Statt upp, og gakk inn til lívið!" - Jesus Kristus er samanhangur lívsins og djúpa meining okkara. Er lívið um at hvørva fyri okkum, so skapar hann eitt nýtt lív*

# 21. januar 2007

uttanfyri stóðu, tí tey ikki hoyrdu til tað jødiska fólkið, fingu loyvi til at sita til háborðs, vegna trúgv teirra á frelsaran!

Hetta er tann stóri útviklingurin, ið hendir í Nýggja Testamenti frá tí gomlu sáttmálatíðini, har fólk Guds var hitt sama, sum tad jødiska fólkið og so til, at øll ið trúgva á Jesus, hoyra til nýggja fólk Guds.

Eftir deyða Jesusar og uppreisn hansara er hitt ovurstóra skiftið hent. Nú er gleðiboðskapur Guds – um frelsu og ævigt lív - ikki bert galdandi fyri jødiska fólkið, men stendur allari mannaættini í boði – ikki sum eitt tilboð fyri lækkaðan prís, men púra ókeypis og treytaleyst, so ótrúligt tað enn ljóðar.

Tí sendi Jesus lærusveinar sínar – og í dag okkum – út í heimin við teimum kendu missións- og dópsboðunum: "Farið tí og gerið øll fólkasløgini til lærusveinar mínar, við tað at tit doypa tey til navns faðirsins og sonarins og hins heilaga anda, og við tað at tit læra tey at halda alt tað, ið eg havi boðið tykkum. Og sí, eg eri við tykkum allar dagar alt til veraldar enda!"

Hin spidalski og herhøvdingin vórðu hjálptir. – Teir – eins og vit nú fáa eisini ta hjálp, ið okkum tørvar – um bert vit geva okkum far um tað. Og tí verða dagsins undurverk og lekifrásøgnir samstundis tvær trúarfrásagnir.

Jesus lekti hin líktráa, hann stedgaði forfallinum og endurskapaði hann. – Hin spedalski er fyri langari tíð síðani deyður, men frásøgnin um hann livir. – Vit liva nú, og tað er til okkara, ið liva við forfalli og upployssing av øðrum slag, at tad verður sagt: Jesus er samanhangur lívsins. Kærleiki Guds er kletturin undir øllum rillandi lívum.

Tað heilt ótrúliga við frásøgnini um Jesus er, at hon snýr seg um, hvussu Gud sjálvur fer inn í heimin, ið er í forfalli, og her tosar vid okkum. Orð Guds hevur myndugleika og mátt, og hetta ger, at tað fremur altíð tað, ið tað sigur og boðar.

Soleiðis er tað veruliga eisini – lutvíst – við okkara egnu orðum. Har er vald í orðum okkum, sum stundum ræðir okkum. Við orðum okkara kunnu vit skapa gleði kring okkum. Vit kunnu byggja upp felagsskapir, bjóða hvørjum øðrum innum og fjálga. - Og orð okkara kunnu eisini seta onnur uttanfyri, oyðileggja felagsskapir, fremja ótryggleika og dapurleika í mannasálum. Tað er tí skylda hjá kristnum at vanda sær um talu sína.

Tá orð okkara hava so nógv vald, hvussu nógv meira vald man ikki Guds orð hava. Tað gleðiliga er, at orð Guds altíð er í lívsins tænastu. Orð Guds fáa ríki Guds fram ímillum okkum, og ríki Guds er alt, ið byggir lívið upp. Tað skapar góðan tokka manna millum og ger gróðrarlíkindi fyri kærleika.

Vit liva í einum heimi, har alt er ótrygt og ferst. Men Gud livir. Orð hansara er her. Ja, hóast vit mugu fara, og heimur okkara fer, so eru vit kortini elskað av skaparanum, ið vil lekja okkum. Tá er hann har við sínum almáttuga orði og talar: Statt upp, og gakk inn til eitt nýtt lív.

Hesum skulu vit trúgva, eins og herhøvdingin úr Kapernaum. Trúgv hansara er einki annað enn eitt barnsligt álit á, at Jesus kann hjálpa. Hann veit, at hansara egnu orð kunnu avrika nógv, eins og hann sjálvur hevði roynt við hermonnum sínum – og hann visti, at Guds orð, tað er Jesus sjálvur, ið kundi avrikað alt soleiðis, ið tað júst hendi fyri hinum spidalska og fyri honum sjálvum.

Gleðiboðskapurin er, at við sama myndugleika talar Jesus til okkara í dag: Jesus sigur: "Eg eri vegurin, sannleikin og lívið!", Statt upp, og gakk inn til lívið!" - Jesus Kristus er samanhangur lívsins og djúpa meining okkara. Er lívið um at hvørva fyri okkum, so skapar hann eitt nýtt lív. Hóast vit hava hug at tveita frá okkum viðhvørt, uppgevur hann tó aldrin okkum. Tvørturímóti, hann sigur: "Eg eri við tykkum allar dagar alt til veraldar enda!"

**Amen**